# Ynskið er universitetsdepil í Marknagili

**Tá Fróðskaparsetrið rundaði tey 25 lat Tórshavnar Kommuna tí eitt grundstykki uppá 50.000 fermetrar í gávu. Tað er vestan fyri Vallaraheimið í Marknagili. Setursrektarin dylur ikki fyri, at hetta hevði verið eitt frálíkt øki til universitet ella lærdan háskúla**

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA OG FRAMTÍÐIN

*Jan Müller*



*Vakurt og hugnaligt er á Debesartrøð, har Fróðskaparseturið heldur til. Men har er longu er trongligt*

*Mynd Jens K Vang*

Tað er neyvan nakað dulsmál, at nógvir av hægru skúlunum og lærustovnunum í Føroyum hava bæði ringar og trongar umstøður at virka undir. Og í hesum sambandi er okkara hægsti lærustovnur, Fróðskaparsetur Føroya einki undantak. Setrið hevur leingi havt ringar hølisumstøður. Hølini liggja spjødd ymsa staðni, og mong teirra eru vánalig.

Rektarin, Malan Marnerdóttir váttar, at so er. - Vit hava ringar undirvísingarumstøður, og umstøðurnar hjá studentunum eru eisini vánaligar. Teir áttu at fingið nógv betri umstøður, tí tað eru studentarnar vit skulu læra at granska og undirvísa, og sum skulu bera hetta víðari. Tað hevði verið best, um teir høvdu góðar umstøður við góðum lesisalum, teldustovum, kantinuviðurskiftum, har teir sosialt og arbeiðsliga kundu verið saman, og vit øll kundu møtst.

Malan Marnersdóttir sigur, at sum nú eru tey 20 vísindastarvsfólkini spjødd út á 4-5 ymsar adressur í býnum og studentarnir somuleiðis. Tað er ein stór hjálp, at undirvísingin á Søgu- og samfelagsdeildini hevur fingið innivist á Sjómansskúlanum. Haraftrat hevur mann fingið eina nýggja teldustovu í eini barakk í Nóatúni. Kortini mangla bæði undirvísingarhøli og arbeiðsumhvørvi til studentarnar. Og skuldi stovnurin verið so mikið heppin at fingið umstøður at sett fleiri vísindastarvsfólk, so hevði neyvan verið pláss fyri teimum.

## Fingu grundøki í gávu

Tað hava annars verið nógv ymisk uppskot til at loysa hølistrupulleikarnar. Mentamálastýrið hevur sett eina millión kr. av til at gera uppskot um, hvussu mann loysir hølistørvin hjá setrinum. Tað ætla tey sær í gongd við í ár og halda fram tey næstu árini.

Hóast torføru støðuna, so vísir rektarin á, at Setrið varð so mikið heppið, tá tað fylti 25 ár, at Tórshavnar Kommuna lat tí eitt grundstykki uppá 50.000 fermetrar í gávu. Tað er vestan fyri Vallaraheimið í Marknagili. Malan Marnersdóttur dylur ikki fyri, at hetta hevði verið eitt frálíkt øki til universitet ella lærdan háskúla.

Sjálv hevur hon havt tilknýti til Fróðskaparsetrið í skjótt 19 ár og hevur verið sera fegin um umstøðurnar á Debesartrøð. Her er hugnaligt og gott, men soleiðis sum tað sær út, eru ikki long útlit fyri, at vit rúmast her. Verður farið at byggja í Marknagili kundi tað verið í stigum. Har hevði mann so kunnað lagt lunnar undir eitt sokallað campusøki við deildum, studentabústøðum, íbúðum til gestalærarar osfr.

Tað var so eisini í hesum andanum, at skipað var fyri eini hugskotskapping innanhýsis á Setrinum í desember í fjør. Har varð eitt uppskot um at byggja út á Debesartrøð, meðan onnur vóru at flyta út í Marknagil, eitt við tí mergjaða heitinum "Vitanarvarði í Marknagili".

Øll hesi mongu árini Malan hevur verið á setrinum hevur verið tosað um at fáa Setrinum betri umstøður og ofta hevur verið víst til fáa húsarúmd í húsinum, har Heilsufrøðiliga Starvsstovan er. - Eg veit ikki, um tað er rætt at tosa um tað longur. Starvsstovan er har. Eg haldi mann skal seta hol á hetta av nýggjum og siga, at nú byggja vit eitt føroyskt universitet, Føroya Lærda Háskúla. Hesi góð 35 árini setrið hevur verið til, eru komnar tríggjar deildir. Mann kann væl hugsa sær tríggjar nýggjar deildir aftrat um onnur 35 ár, og tí er umráðandi at byggja soleiðis, at møguleikar eru at útbyggja aftur seinni. Tað krevur pláss, og tí er hugskotið um ein universitetsdepil í Marknagili gott. Og so liggur økið eisini tætt Havnini við góðum útsýni til íblástur hjá bæði studentum og lærarum.



*Malan Marnersdóttur, rektari her á tí stóra økinum í Marknagili, sum Tórshavnar Kommuna hevur latið Fróðskaparrsetrinum til eitt møguligt framtíðar universitetsøki*

*Mynd Jens K Vang*

# hygg & hoyr



**Frá fríggjadegi 8. mars til hósdagin 14. mars**

## LISA 20 ár




Í samband við at LISA (Listafólkasamband Føroya), ið er meginfelag hjá listafólkafeløgunum í landinum hevur 20 ár á baki, sendir Sjónvarp Føroya í viku 11 hesar sendingar:

***Mánadagur 11. mars***
*21.15 Rithøvundurin og listakvinnan - Basalt um Rannvu Kunoy og Alexander Kristiansen*
*21.50 Lívsmyndir 1 - tónleikasending*

***Týsdagur 12. mars***
*20.50 Hugurin at skapa - um listakvinnuna Guðrið Poulsen*
*21.15 Lívsmyndir 2 - tónleikasending*

***Hósdagur 14. mars***
*20.45 Svartur sannleiki - um listamannin Ingálv av Reyni*

## Ein tarnað vika



*Heri á Rógvi ummælir*

Tað hevur verið rættiliga nógvur kavi hesa seinastu tíðina. Eitt gott høvi til at sita inni og kanska tendra fyri tí stóra kassanum.

Fyri stuttari tíð síðani endaðu Olympisku leikirnir í Salt Lake City, USA. Hetta eru teir sokallaðu vetrar olympisku leikirnir, ið savna mong túsund fólk. Sum føroyska sjónvarpsrásin raðfesti hesar olympisku leikir, so skuldi ein fegin trúð, at teir vóru útsettir ella als ikki vóru á skránni hesaferð. Millum lítið og einki av tilfari varð sent úr Salt Lake City, og tað, ið varð sent, gav sum so ikki nógva meining, tí tað var ómetaliga torført at finna heild. Tað er at fegnast um, at íshokky slapp framat á skíggjan so mikið ofta, men hetta tykist mest sum tilvild meira enn nakað annað. Tað er givið, at hesir leikirnir kanska ikki eru teir leikirnir, ið føroyingar hava allarstørstan áhuga fyri, men hetta er framvegis ein risastór ítróttarhending, og olympiskir leikir eru vanliga nakað, ið kann savna fólk frammanfyri skíggjan. Hesir seinastu leikirnir fara í søguna, sum teir løgnastu leikirnir higartil. So at siga einki fréttist áðrenn, og hetta var ikki bara nakar einstakur miðil, eftir leikirnir eru nakrar doping gølur komnar fram annars einki. Og, sum sagt, ikki nakað stórvegis var at frætta um leikirnar, meðan teir fóru fram. Hetta er rættiliga løgið, tá hugsað verður um talið av rásum og sendimøguleikum sum heild. Í Føroyum fuku leikirnir framvið. Útvarp Føroya gjørdi sína skyldu við at upplýsa føroy-ingar eitt sindur um hvat og hvussu, og hetta er eisini gott, men kann ikki minni tykjast argandi, tá so at siga eingin mynd er at finna av leikunum. Tað er kanska eitt sindur torført at verða vónsvikin av sjónvarpi, men undran merkist, tá stórhendingin ikki finnur lítla landið í Norðuratlantshavi.

Møguleikararnir at fylgja Olympisku leikunum um fylgissvein vóru sjálvsagt fyri ein part til staðar. Sjálvur valdi eg eisni í seinastu viku at staðfesta mítt trúfesti við at ogna mær at ein nýggjan móttakara, soleiðis at fjarskotna signalið kundi fáa betri sømdir og eg meira útlendskt.

**Mentan**

Nú mentan er komið á borðið í áliti, so er tað ikki lítið, ið tosað verður um hesa góðu mentan. Brádliga er hugtakið endurføtt, og leitanin eftir týdninginum enn einaferð sett ígongd. Tað eru uttan iva nógv, ið hava bíðað leingi eftir hesum áliti, og hetta merkist eisini og er heldur ikki av leið, tá hugsað verður samfelagskjakið.

Tað hevur eisini ávirkað so mikið, at stóra og tunga mentunarsendingin, Stýrivolt, sleppur framat. Sendingin byrjaði í sambandi við vetrarskránna hjá Útvarpi Føroya, og hon hevur eisini ment seg. Verturin er gamal kenningur í útvarpshøpi. Sendingin hevur funnið ein fastan form, og teir tretivu/tríati minuttirnir rigga sum heild væl. Navnið er eftir einum kortspæli. Einum kortspæli, ið undirritaði einaferð í sambandi við próvtøku stríddist við at læra seg. Hetta góða kortspæl telist ikki longur millum tey spølini, ið mest javnan verða spæld, men hevur tó røtur í Føroyum.

Tað kann tykist løgið, at roynt verður at skapa eina næstan listarliga fjarstøðu, tí hetta er ikki ein stílur, ið hóskar. Sendingin er sum so ein góð sending. Evnini, ið verða tikin fram, hava ringt við at fóta sær aðrastaðni. Tískil er gott við einari tílíkari sending. Onkuntíð verður grópað í so langt inn í egnan heim.

Sjálvur stríddist eg leingi við at læra meg stýrivolt, men hetta seinasta útspælið kennist onkursvegna munandi lættari.

**Brúkarin**

Í londunum rundanum okkum sært tú javnan sokallaðar brúkarasendingar. Ein tann frægasta er at finna hjá stórabeiggi Sjónvarp Føroya, Danmarks Radio. Sendingin Rene ord for pengene er ein frálíka góð brúkarasending, sum setir góðan óheftan tíðindaflutning í gott ljós. Har leggur sendingin fyri tað nógva ikki fingrarnar ímillum.

Føroysku megin stjørnurnar er eisini ein brúkarasending stáplað upp á beinini. Okkara millum er heitið á sendingini, sum loyvir TÆR – brúkarunum – framat. Vanligi persónurin, t.e. ikki politikarar, sleppur at siga sína hjartans meining.

Lat tað eisini verða sagt, at tað er frálíka gott og ikki minni upp á sítt pláss, at ein sovorðin sending sleppur framat. Skalt tú skapa eitt meira kjakstøði, og ikki einans tosað um, hvat ein kjakmentan er, ella hvussu hendan verður til, so er neyðugt við tílíkum sendingum.

Ógvuliga eyðkent var fyrsta evnið fólkaskúlin. Hetta savnandi áták í føroyska samfelagnum slap framat, og sjálvandi skuldu vit verða mint á tey mongu álit og skriving aftur og fram um skúlan. Í so máta gjørdist kjakið púrasta deytt. Prátið var um »børnini« sum um talan var um eitthvørt fjarskotið evni, ið bert skuldi fáast upp á pláss. Tað skaðar ikki at tosa meira við ístaðin fyri um hesi góðu børn, ið allarhelst gjørdust mestsum í ørviti um tað, ið varð sagt í sendingini. Ein sending, ið fullkomiliga vantaði stev og dynamik.

## Vitin




## Tá ið eg havi málað summarhúsið




## Hva' med hunden




## Baren – Afstemning

